# Kvinnur og menn eru bara so ymisk



*Kærleikin er fundamentið hjá níggju út av tíggju kvinnum. Men ein kvinna í dag vil hava alt – og tað er ikki lætt, sigur Pernille Aalund, sum fríggjadagin helt fyrilestur á ráðstevnu um kvinnuligar leiðarar*

**Kvinnur eru øðrvísi enn menn. Hetta merkir øðrvísi eginleikar og nógvar fyrimunir, heldur Pernille Aalund, sum frá egnum royndum heldur fyrilestar um og til kvinnur**

SAMRØÐA
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

- Menn og kvinnur eru bara so ymisk.

Soleiðis ljóðar eitt av grundsjónarmiðunum hjá Pernille Aalund. Hon er Í Føroyum í hesum døgum fyri at halda skeið saman við Joan Peitersen um kvinnuligar leiðarar.

Hon er professionel allan vegin. Talugávurnar eru sum hjá stinnasta prestinum. Kortini er hesin boðskapurin eitt sindur meira vendur móti tí eina kyninum – og kanska meira livandi.

Hon livir í stóran mun av sínari vitan um kvinnur. Og vitanina hevur hon frá sær sjálvari.

– Eg varnaðist, at mínir vinkonur og eg høvdu júst teir somu trupulleikar og høvuðbrýggj við okkara monnum og okkara arbeiði. So tað var lætt at ganga útfrá, at tað høvdu aðrar kvinnur eisini.

Við mikrofonina í Útvarpi Føroya riggar tað væl. Hon strýkur avstað við sínari vitan um kvinnur og evni, sum viðvíkja kvinnum. Hetta er fríggjakvøld, og hon er komin landið fyri nøkrum tímum síðani.

Longu leygardag fer hon aftur av landinum, tá skeiðið í Gamla Meiarínum er liðugt.

Eftir at hugsa seg um og kanna eitt sindur, so kom hon til áðurnevndu niðurstøðu, at menn og kvinnur bara eru so ymisk.

Menn og kvinnur hava bara hvør sín innfalsvinkul til arbeiði, heimalívið og annað. Eg vil ikki liva uttan menn – nógvar menn. Tað er eisini eitt natúrligt mótspæl. Men mítt ættarlið av kvinnum vil ikki setast í bás sum undanfanin ættarlið.

Hetta við, at alt skal vera alt skal vera eins og skerast beint tvørturyvir, tað riggar bara ikki í praksis. Vit vilja hava eins møguleikar, men vit eru ymisk, og tað er sumt, kvinnur eru betri til at menn, og tað er eisini okkurt, menn duga betri enn vit kvinnur. Men tað merkir ikki, at vit skulu halda okkum aftur – tvørturímóti.

Og boðskapurin í útvarpssamrøðuni um leiklutin hjá kvinnum vinnur eisini frama hinumegin rútin, har fylgisveinarnir – av sama kyni - umboðandi fyrireikararnar nikka játtandi til vísdómin hjá Pernillu og Joan.

Árliga heldur Pernille millum hálvthundrað og hundrað fyrilestar um árið, og hetta merkist. Ein avslappað og væl balanserað kvinna, sum ikki fjalir sínar dygdir.

## Bankaði á hurðina

Pernille Aalund er víðagitin í Føroyum – kanska serliga millum kvinnur – fyri sínar sendingar á TV3 – Mænd ingen adgang og Pernilles Univers, sum vórðu sendar fyri nøkrum árum síðani. Pernille Aalund er í dag 41 ára gomul.

– Eg møtti mínum manni – sum eg seinni eri skyld frá – tá eg var 17 ára gomul. Eg gjørdist ógvuliga forelskað í honum, og vit skuldu bara giftast – tað kundi ikki ganga nóg skjótt. Eg fekk so mítt fyrsta barn, tá eg var 21 ára gomul. Fyri meg var tað ein høg raðfestin at fáa børn. Eg fekk eitt barn afturat tvey ár seinni, og eg var heima hjá teimum sum húsmóðir í fimm ár.

– Eftir hetta kendi eg ein hug eftir nýggjum avbjóðingum. Fór so út og bankaði upp á dyrnar hjá einari útvarpsstøð og spurdi, um tey ikki kundi brúka meg til okkurt – og tað kundu tey. Hon byrjaði sum sjálvboðin og byrjaði so smátt at førka seg innan radio.

– Tað gekk skjótt fyri seg. Eg var fyrst við í ymsum framleiðslum; fekk síðani mína egnu sending. Seinni havi eg lagt rødd til ymiskt. Faktiskt byrjaði eg við at vaska og gera kaffi og havi síðani verið allanvegin gjøgnum skipanina.

Eftir at hava framleitt útvarpssendingar, vildi hon flyta seg víðari. Og hennara fyrsta sjónvarpshugskot var ein dokumentarsending um kvinnur við heilaskaða. Umframt hetta, so var hon við í nógvum ymsum sendingum og verkætlanum.

Mitt í øllum hesum rokanum varð eg biðin um at møta upp til eina casting. Eg møtti upp, og eg hevði veruliga ongar ambitiónir. Tað, at hetta ikki hevur verið mítt fremsta ynski, hevur altíð verið mín størsta styrki. Hetta ger, at tú tekur tað meira róligt og ikki roynir at líkjast nøkrum, ella tú bara vilt á skíggjan. Skal tað skiljast soleiðis, at tú ert sjálvlærd?

– Ja, tað kanst tú gott siga. Men eg haldi ikki, at tað kann vera øðrvísi. Tú kanst gerast journalist, men skalt tú allanvegin rundanum alla framleiðslueindina, so er tað valla nakar annar vegur. Eg endaði jú við at stovna mína egnu framleiðslufyritøku.

## Talk show

Henda góða casting gjørdist so byrjanin til eina yrkisleið innan sjónvarp. Fyrst vóru tað barnasendingar. Fyrstu ferð, Pernille veruliga gjørdi vart við seg, var í sendingini "Vis mig dit køleskab". Harfrá fór hon víðari til TV3 og sendingarnar Mænd Ingen Adgang og seinni Pernilles Univers. Tá TV3 – serliga í høvuðsstaðnum – hevur verið sera væl umtókt, so er ikki nógv galið í, at Pernille millum føroyskar kvinnur og menn eigur sín lut av hyggjarum og fjepparum.

Hesi tíðina hendi so nógv ymiskt. Eg og maðurin fóru frá hvørjum øðrum, og byrjaði at varnast nøkur ting við øðrum og mær sjálvum. Men harragud menn og kvinnur eru bara so ymisk. Menninir hava fótbólt og alt møguligt, og nú hugsaði eg at gera okkurt, sum bara var fyri kvinnur. Eg flutti kanska øll míni egnu evni og sorgir inn í eitt konsept. Sendingin skuldi bara vera fyri kvinnur, og tað skuldi vera framleitt av kvinnum.

Og hon fór ígongd. Fór enn eina ferð at banka á hurðar og dyr. Spurdi seg fyri hjá TV3, um tey vóru við upp á at gera tílíkar sendingar, og tað var gamaní.

Munurin á hesum sendingunum og øðrum var, at alt varð gjørt av kvinnum og bara kvinnum. Onkrir mannligir gestir vóru, men tað var so tað einasta. Øll redaktiónin, tøkningar og leiðsla vóru kvinnur.

– En lydmand gav ingen mening i vores produktion, sigur Pernille.

Sambært Pernille var tað eisini upp á tíðina, at ein tílík sending kom á skíggjan. Tað var eisini partur av einar bylgju, sum var nógv frammi kring allan heim, har kvinnur skuldu meira fram.

– Eg eri fødd í sekstiárunum, og mín generatión av kvinnum eru farnar um mørk og hava gjørt uppreistur við støðuna hjá kvinnum. So eg hugsaði, at tíðin nú var komin til eina tílíka sending.

Og sendingunum varð tosað um alt millum himmal og jørð, sum hevði við kvinnur at gera. Alt frá sorg og kærleika til porno og sex.

Er tað nakað, tú ikki torir at práta um og viðgera?

Eg tori at siga tað, eg meini, og at práta um alt, men eg havi sjálvandi míni mørk til tey ymsu evnini. Tað, at eg tori at siga nógv, trúgvi eg eisini hevur gjørt tað, at nógvar kvinnur hava nýtt meg til at fáa sagt nøkur ting ígjøgnum.

Hetta síðsta er kanska eisini orsøkin til, at sendingarnar av mannligum hyggjarum hevur fingið av grovfíluni, men ikki av øllum. Men kritikkin tekur hon ikki so illa upp.

Framleiðslufelagið aftanfyri sendingarnar eigur Pernille. Hon fór heilt einfalt í bankan og lánti sær og fyritøkuni pening til at framleiða sendingarnar fyri.

Og hetta við at taka eina risiko hoyrir meira heima í hennara meiri maskulinu síðu, heldur hon.

– Eg havi eina væl útviklaða maskulina síðu. Mær dámar at taka kjansir. Júst tá tað er mest vandamikið - tá tú hevur lánt eina millión í bankanum og ivast, um tað fer at ganga ella ikki. Tá havi eg tað gott. Tað haldi eg er ein partur av mínari typu. Trúgvi eisini, at tað er ein stórur partur av kvinnum í mínum ættarliðið, sum hava hendan eginleika.

*"Eg havi eina væl útviklaða maskulina síðu. Mær dámar at taka kjansir. Júst tá tað er mest vandamikið - tá tú hevur lánt eina millión í bankanum og ivast, um tað fer at ganga ella ikki. Tá havi eg tað gott."*

*"Tað, at hetta ikki hevur verið mítt fremsta ynski, hevur altíð verið mín størsta styrki. Hetta ger, at tú tekur tað meira róligt og ikki roynir at líkjast nøkrum, ella tú bara vilt á skíggjan."*

Sum kendur persónur í Danmark hevur Pernille javnan kunna sæð seg sjálva í fjølmiðlunum og eisini tí meira litríka slagnum.

Og hetta er nakað, ein má finna seg í, tá ein verður kendur persónur, hóast ikki alt skrivligt um ein sjálvan er líka dámligt at lesa, sigur Pernille.

## Kærleiki er alt

Spurd, um hon bert talar til kvinnur, sigur hon, at tað er hetta evnið, hon hevur kunnleika til, og hon hevur ongar ætlaninir at byrja at halda fyrilestrar fyri øðrum.

Eg haldi, at tit skulu finna tykkum tykkara egnu serfrøðingar, sigur Pernille. Men vit loyva okkum at førka okkum inn á evnið, sum hevur sett mangan skarpan teinkjara skák mát. Hvat ynskja kvinnur so?

– Trupulleikin er, at vit vilja fegnar vilja hava alt.

Kvinnur vilja hava ein mann, sum tær elska, og sum elskar tær. Helst restina av lívinum. Kærleikin er sera, sera høg raðfesting hjá kvinnum.

So vilja kvinnur eisini hava børn og familju. Kanska ikki allar kvinnur, men tær flestu. So vilja vit hava tryggleika. Og tað nýggja ættarliðið av kvinnum vilja umframt alt hetta eisini hava ein flottan kropp – helst restina av lívinum, ikki viga ov nógv, eitt pent hús, penar møblar, pengar, gott arbeiði, sjálvstøðug osfr.

Men klárt nummar eitt eru maðurin og børnini. Kærleikin er fundamentið hjá níggju útav tíggju kvinnum. Tað siga mínar royndir mær.

## Kunna og skula

Tá hetta blaðið er í sølubúðunum er skeiðið hjá Pernille liðugt. Men fyri føroysku luttakarunum hevur Pernille greitt frá egnum royndum. Hon ætlar á ongan hátt at gera seg til serfrøðing í føroyskum viðurskiftum, men hon ætlar at siga frá tí, hon veit og hevur upplivað.

– Eg skal tosa til kvinnur, og tað er so líkamikið, hvørjum landi hesar koma frá.

Ráðstevnan á Gamla Meiarínum snýr seg um kvinnuligar leiðarar, og tað er nakað, kvinnur ikki skulu halda seg aftur við, ljóðar tað frá Pernille.

– Trúgv upp á tað. Allar royndir og kanningar vísa, at kvinnur egna seg væl sum leiðarar, tí tær duga at síggja og hoyra nøkur ting, mannliga leiðslan ikki sær og hoyrir.

Alt ber til, sigur Pernille Aalund at enda.

## Fakta

**Navn:** Pernille Aalund
**Aldur:** 41 ár
**Familja:** Eigur trý børn — 19, 17 og 2 ára gomul. Hon heldur saman við pápanum hjá yngsta barninum.
Hon hevur í nógv arbeitt í fjølmiðlum. Best kend í Føroyum er hon uttan iva fyri síni talkshow á TV3 – Mænd ingen adgang og Pernilles Univers.
Hon hevur skrivað fimm bøkur. Teirra millum tvær "slankibøkur" og tvær skaldsøgur.
Seinnu árini hevur hon eisini hildið nógvar fyrilestrar. Hon sigur sjálv, at hennara serkunnleiki er at práta til kvinnur um kvinnur.
Hon hevur sína egnum framleiðslufyritøku, sum framleiðir ymisk sløg av sjónvarpsendingum. Seinast var hon vertur í Temptation Island.
Tvær nýggjar bøkur eru ávegis, og hon arbeiðir eisini við fleiri dokumentarsendingum.